gult cyan magenta svart



## EG MEINI TAÐ

# Gev okkum betri tøkni!



SJÓNARMIÐ
*Elin Heinesen*

Kennir tú hana, sum aldrin kundi droymt um at keypt sær eina teldu ella eina fartelefon ella fingið sær atgongd til alnótina, hví hvat í Guðs garði skuldi fyrimunurin verið við tí? Tað er jú bara tíðar- og peningaspilla og alt ov fløkjasligt! Og so er tað hon, sum ikki kann fáa nóg mikið av tí og sum heldur fast uppá, at nýggja tøknin er ein Guðs gáva til menniskjuna.

Hvør hevur so rætt? Eg haldi báðir partar – á hvør sín hátt. Tað er gott at vera forvitin, men tað er eisini sunt at vera fyrivarin og ikki bara gloypa øllum nýggjum. Allar tær nýggju uppfinningarnar gjørdar seinastu 100-150 árini – myndatólið, telefonin, útvarpið, sjónvarpið, telefonsvararin, fartelefonin – fingu mótstøðu í fyrstani, men blivu so við og við ein meira náttúrligur og sjálvsagdur partur av gerandisdegi okkara, sum vit ikki longur seta spurnartekin við á sama hátt. Men ofta skulu vit bíða eitt heilt ættarlið, áðrenn ein nýggj uppfinning verður góðtikin av flest øllum.

Í dag gongur menningin so skjótt, at óbalansa kemur í. Summi taka nýggju tøknina til sín beinanveg, men nógv hava ilt við at fylgja við. Hetta merkir, at tá tey síðstu endiliga hava tikið eina nýggja uppfinning í brúk og so smátt eru farin at venja seg við hana, so hava tey fyrstu kanska longu skift teirra út fimm ferðir við enn nýggjari tøkni langt frammanfyri hini.

Tey konservativu vilja fegin halda fast við tað góða, gamla, sum tey jú kenna so væl, meðan tey ótolnu hava sovorðnan skund, at tey næstan ikki kunnu bíða eftir at skifta út við nýggjari vørur. Tað er ikki nøkur løtt uppgáva hjá teimum, sum framleiða kunningartøknina, at nøkta so ymiskan tørv samstundis. Oftast endar tað við, at minst verður hugsað um tey, sum ynskja at brúka síni gomlu tól til tey verða uppslitin.

Framleiðararnir hava jú hug at streingja á fólk at skifta út gamalt við nýtt skjótari og skjótari, so teir kunnu selja so nógvar vørur sum gjørligt. Við tí úrsliti at summi detta heilt burturúr menningini, tí tey fáa gænir av at kenna seg kroyst til ymiskt, sum tey avgjørt ikki kenna seg trygg við.

Tíbetur hava vit sum brúkarar møguleika fyri ávirkan. Tað eru vit, sum avgera, um vit vilja keypa eina vøru ella ikki. Og ERU nú allar hesar vørur við tí nýggjastu tøknini so góðar, tá alt kemur til alt? Tað er ikki heilt vist, at tað altíð bara er konservatisma, sum ger, at summi ikki tíma at vera við. Ein av orsøkunum til, at nógv ikki tíma at keypa tað nýggjasta nýggja við somu ørkymlandi ferð, sum menningin fer fram, kemst av, at tey duga væl at síggja, at vørurnar rætt og slætt ikki eru nóg góðar enn og kortini skjótt vera skiftar út við aðrar nýggjari og betri vørur.

Við kunningartøknini hava vit fingið eitt amboð við íbygdum møguleikum, sum eggja hugflogið um øll mørk. Men tøknifrøðiliga menningin kann í veruleikanum slettis ikki fylgja við tí framskygni, nógv hava um, hvat kunningartøknin og t.d. alnótin KANN blíva til.

Kunningartøknin virkar, sum hon er nú – hóast fantastisku møguleikarnar – so avmarkandi í veruleikanum, tí hon lokkar við at lova alla verðina, men kann bert halda sera fá lyfti um tað, vit vænta okkum av henni. Kunningartøknin er ikki serliga rakstrarliga álítandi, og kennist tí oftani meira sum ein forðing, enn sum tað henta amboðið, tað var ætlanin, hon skuldi vera.

Í mong ár hevur talan verið um, at útvarp, sjónvarp, alnót og telefon við tíðini fór at renna saman til ein miðil. Enn er nakað eftir á mál hesum viðvíkjandi, men tað er, sum um vit bara bíða eftir at tey heilt RØTTU tólini koma fram og inn í gerandisdag okkara. Tól, sum veruliga fara at liva upp til vónirnar um at gera gerandisdagin léttari og kanska stuttligari? Tey tól, sum vit í dag nýta, kennast oftani bara sum vánaligar eftirgerðir av nøkrum, sum í framtíðini fer at vera nógv meira munadygt, meira intuitivt skipað og meira nýtsluvinarligt – og so bíligt, at vanlig fólk ikki fara á húsagang av at útvega sær tað.

So smoyggið ermarnar upp, kæru framleiðarar, og bjóðið fram vørur, sum veruliga gera munin, og ikki bara gera gerandisdagin truplari!

Vikuskifti

Postboks 19, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: birgir@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Birgir Kruse

# Á atlantisku eggini

MYNDLIST
*Birgir Kruse*

Tey fimm listafólkini, sum fyri jól høvdu myndlistaframsýning í New York undir heitinum »From the Atlantic Edge«, halda nú fram í Íslandi undir heitinum »Mitt í eilífðar útsæ«.

Tey fimm føroysku listafólkini eru Astri Luihn, Sigrun Gunnardsdóttir Niclasen, Amariel Norðoy, Eyðun av Reyni og Kári Svensson.

Leygardagin letur Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri framsýningina upp. 49 listaverk verða sýnd fram á eini 300 fermetrum. Og vit eru heilt væl nøgd við hølini, sigur Sigrun, sum eisini er skrivari í Felagnum Føroysk Myndlistafólk.

Framsýningin er í Hafnarborg, sum er menningar- og listastovnur á Hafnarfirði, einar 15 kilometur frá høvusstanum Reykjavík. Opið verður fram til hin 23. apríl.

Framsýningarhølini eru í húsum, ið stava frá 1921, har apotek og íbúð hevur verið. Í 1947 keypti ein íslendskur apotekari húsini og seinni gav hann býnum bæði hús og egið listasavn. Síðani 1986 hevur Hafnaborg verið gestaatelier hjá vitjandi listafólkum. Fyristøðukvinna í Hafnaborg er Pétrún Pétursdóttir, sum tók við í 1988.

Ferðandi framsýningin »From the Atlantic Edge« byrjaði í desember mánað í fjør, tá ein væleydnað framsýning varð hildin í New York. Tá framsýning í Íslandi er av, verður farið til onnur Norðurlond og seinri eisini til onnur lond í Europa.

Tjúgu stuðlar standa aftanfyri føroyska myndlistarliga tiltakið. Hetta eru almennir stuðlar og fyritøkur. Teirra millum eru føroyskir grunnar, peningastovnar og fyritøkur, tveir danskir stuðulsgrunnar og tvær útlendskar oljufyritøkur.



*Fimm vælnøgd føroysk myndlistafólk. Frá vinstru Eyðun av Reyni, Kári Svensson, Astri Luihn, Amariel Norðoy og Sigrun G. Niclasen*

# Teldueygað

TØKNI
*Birgir Kruse*

Ein framtíð uttan pappír, tað man vera dreymurin hjá mongum. Í hvussu er, tá postmaðurin kemur við rokningum og torskildum fráboðanum úr almenna skrivstovuveldinum. Innan telduverðina er mangt, ið bendir á, at júst hesin dreymur er málsetningurin og hornasteinurin undir mest sum øllum virksemi. Lukkan er ein framtíð uttan pappír.

Xerox fyritøkan, sum helst hevur elvt til størstu pappírsnýtslu í nýggjari tíð, gongur fremst í kappingini. Henda fyritøka, sum umframt fotokopimaskinuna, eisini er upphavið til instu lívgøgn í telduni, hevur aldri slept dreyminum um pappírsleysu skrivstovuna.

Granskarar hjá Xerox hava sett sær fyri, at gera tað munin léttari, at samantvinna elektronisk skjøl við tey, sum eru úr pappíri. Ítøkiliga úrslitið stendur nú á borðinum. Á trimum beinum. Tað eitir PageCam og sær út sum ein fornur lutur, uttan úr rúmdini, ið kanska er dottin úr MIR. Men hetta er einki annað enn eitt talgilt eyga, sum verður bundið í telduna. Rætt sum eitt web-kamera.

Í talgilda PageCam eyganum er eitt Philips myndatól. Eins og eitt vanligt web-kamera, fangar hetta talgilda eygað alt, sum flýtur fyri tess ásjón. Leggja vit Dimmu, Sosialin, ella alla sálmabókina undir eygað, so sæst teksturin straks á telduskíggjanum. Klárur og skarur. So er bara at trýsta á rætta knøttin, velja tekstin, og eitt-tvey-trý, so er úrvaldi teksturin gjørdur til eitt skjal í telduni.

Sum ongan ting kann hesin tekstur, stuttur ella drúgvur, leggjast inn í eitt Word-skjal, ella kanska Power Point, um úrslitið skal brúkast til almenna framløgu. Jú, pappírsleysa skrivstovuveldið breiðir seg. Meiri kann lesast um teldueygað á www.pagecam.com.

Hetta við teldueygum hevur eisini vundið uppá seg í øðrum sambandi. Eitt nú tí lúrandi pornografiska. Í Danmark hevur fyritøkan »Dobbeltsengen« sýnt fram eitt ungt par, sum vil vísa alt. Fyri gjald, sjálvandi. Um eina kjak-rás ber til at biðja unga parið um líkt og ólíkt og so hyggja. Við hesum dømi ber enn einaferð til at staðfesta, at tað helst er pornoídnaðurin, sum fremstur av øllum slóðar fyri tøknifrøðiligu menningini.

Sjónvarpssendingarnar »Big Brother« og »Baren« eru eisini dømi um nýggju talgildu tøknina, sum letur upp fyri øllum slúsum. Sjálvt í baðirúminum er eitt eyga, sum sær alt kann varpa undurfullu sjónina út til undrandi áskoðaran. Bara tú ert íbundin.

Fyritøkan Canon er eisini kend á tøkniliga økinum. Styrkin hjá hesari fyritøku hevur leingi verið avritan og myndatøka. Um heimasíður Canons, eitt nú tað donsku www.canon.dk, ber til at fáa samband við alskyns talgild teldueygu kring allan heimin. Teldueygu, sum hava ein meiri almennan áhuga.

Til ber at síggja, um sólin er risin í New York, hvussu skipini sigla inn og út í heimsins stóru havnum og um tað er myrkt í Kina.

Umrøddu teldueygu hjá Canon eru harafturat samvirkin. Tað vil siga, at tú kanst velja eitt nú sjónarhorn og frástøðu, har sum myndatólið er sett upp. Tá tú so ert íbundin og hevur fingið ræði á teldueyganum, sær allur heimurin, hvussu tú velur at skoða fremmanda staðin, har myndatólið er. Ein spennandi møguleiki, ætlar tú at ferðast til hesi støð. Men fleiri eru um boðið, so bíðirøðirnar til talgildu teldueyguni hjá Canon kunnu verða langar.



*Talgilda myndatólið PageCam á skrivstovuborðinum*



**LISTASKÁLIN. Hansina Iversen er ein teirra, ið gevur føroyskari málningalist nýtt andlit. Í dag letur hon saman við trimum ungum listafólkum úr Danmark upp framsýning í Listaskálanum**

# Litir og ljós



*– Fólk uttanlands hava stóran áhuga í Føroyum og føroyskari list. Eg verði boðin við á framsýningar, og tað er avgjørt eitt privilegium í mun til onnur ung úr Norðurlondum, sum skulu stríðast nógv meiri enn eg at sleppa uppí part, sigur Hansina Iversen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

MYNDLIST
*Turið Kjølbro*

Tað er ikki tradisjónella føroyska landslagið, málaríini hjá Hansinu Iversen ímynda. Hon er abstraktur málari, sum málar myndir, ið ikki ímynda nakað ávíst, men heldur bera tað vakra fram.

– Skýggj og umskiftiligir formar hava altíð hugtikið meg, ljósið, víddarspælið og perspektivið, sum eru í. Eg arbeiði ikki út frá plássum sum eru kend, men útlendsk listafólk siga, at tey síggja føroyska náttúru í mínum málaríum. Tá ið eg komi inn í mítt atelier, tá ið tað er tómt, byrji eg altíð við einum oyggjalag ella landslagi við sjógvi og himmali. So kemur hitt so líðandi. So føroyska náttúran er har onkusvegna, sigur Hansina Iversen.

Saman við listafólkunum Mini Blume, Kathleen Toft og Peter Bjørn Franceschi úr Danmark letur Hansina Iversen upp framsýning í Listaskálanum í dag. Tey eru javngomul, øll fødd í seinnu helvt av sekstiárunum, hava atelier í sama bygningi í Keypmannahavn, og eru vinfólk. Tey hittust í Føroyum fyri nøkrum árum síðani, og hugtikin av landslagnum her, hava tey líka síðani tráað eftir at komið aftur til Føroya at sýna fram.

– Vit eru ógvuliga ymisk og spenna vítt í listini. Heilt frá súmbolskum, abstraktum og minimalistiskum yvir í monumentalar stórar realistiskar myndir, har figurarnir, ið eru á, síggja út sum veruligir, sigur Hansina Iversen, sum fegnast um, at henda framsýningin er vorðin veruleiki, tí tað er sjáldsamt, at ung listafólk sýna fram í Føroyum.

### Arbeiðið íblásturin

Hansina Iversen er útbúgvin á Myndlista- og Handíðaskóla Íslands og Bildkonstakademin í Helsingfors í Finnlandi. Í fjør fekk hon eitt tvey ára íverksetanarstipendii frá Statens Kunstfond. Hon er eitt av okkara ungu listafólkum, ið stórar vónir eru um. Hansina gongur aðrar leiðir enn tær, ið hava eyðkent myndlist okkara tað seinasta ættarliðið, og hon er ein teirra, ið gevur føroyskari málningalist eitt nýtt andlit.

– Tað er sjálvt málaríið og innihaldið í málaríinum, sum er umráðandi. Í mínum hugaheimi ræður tað ikki um nakað, sum er sum so, men heldur um formar, sum eg finni fram og komi fram til í sjálvari arbeiðstilgongdini. Íblásturin kemur av at arbeiða. Eg byrji við fleiri løriftum og so formar eitthvørt seg á løriftinum, sum eg so arbeiði víðari við. Hetta er ein áhaldandi arbeiðstilgongd, sum flytir seg alla tíðina og tí veit eg ikki, hvat kemur burtur úr, fyrr enn eg eri liðug, greiðir Hansina Iversen frá.

Við á framsýningini hevur Hansina Iversen 19 verk, sum hon hevur arbeitt við síðani seinasta summar.

### Frá náttúruni

Í ættarliðnum hjá Hansinu eru eins nógvar kvinnur sum menn, sum eru listafólk. Hansina heldur ikki kjakið um tað kynspolitiska í føroyska list og hvør ræður og ikki vera áhugavert.

– Tá ið eg sýni fram saman við samtíðarlistafólkum eru vit avgjørt á jøvnum føti. Onkusvegna eri eg í mínum uppvøkstri ávirkað av teimum listafólkum, sum hava verið og eru. Í ryggmerginum kanska, men ikki beinleiðis í tí eg geri. Eg leiti heldur ikki til føroyska list eftir íblástri. Tá ið tú býrt í Føroyum, verða náttúran og bygdalagið so sterk, at tú sum listafólk kemur ikki uttan um tað. Ung føroysk listafólk flyta seg burtur frá náttúruni í og við, at tey øll arbeiða uttanlands. Listafólkini, sum búgva og arbeiða í Føroyum, fara ikki at broyta seg munandi. Ikki tí, at tey eru steðgað upp, men tí tey arbeiða við einum evni, sum tey ikki kunnu sleppa. Tey blíva við at halda tað vera áhugavert og royna uppá nýggjar mátar við sama evni. Soleiðis er alla aðra staðni eisini. Tú kanst til eina og hvørja tíð kenna listafólkini aftur í tí tey gera. Hinvegin eiga listafólk ikki at broyta seg fyri at verða áhugaverd hjá øðrum. Sum listafólk arbeiðir tú fyrst og fremst út frá tær sjálvum og fyri teg sjálvan. Sjálvandi verður tú ávirkaður av kritikki, men tú kanst ikki broyta nakað, fyrr enn tú sjálv kennir, at tú ert steðgað upp.

Hansina Iversen dugir ikki at fáa eyga á nýggjar spírar í føroyskari list.

– Eg haldi ikki, at nakað nýtt er hent í langa tíð. Alt verður so innilokað og lokalt. Listafólk áttu at brúkt størri orku at farið út í verðina og sæð, hvat rørir seg í myndlistini í dag. Fyri mær virkar tað sum um, at tað als ongan áhuga hevur millum myndlistafólk í Føroyum. Tey fylgja ikki við hvat hendir og gera tey ikki tað, lata tey aftur fyri øllum. Ein av størstu íblástrarkeldunum er at síggja onnur listafólk og hvat ið tey gera. Ofta kann man brúka okkurt man hevur sæð og arbeiða víðari við. Tað letur upp fyri onkrum, sum tú sjálv hevur verið blind fyri. Sum listafólk mást tú leita og ein lærir alla tíðina.

### Privilegium

Hansina Iversen er við á Várframsýningini á Chalottenborg í ár. Umframt var hon við á Várframsýningini í Listaskálanum, sum júst er tikin niður. Í summar skal hon taka lut á eini ferðaframsýning ið reikar úr Litava, til Finnlands og Svøríkis og endar í Føroyum. Umframt verður hon við á eini sýning hjá listafelagnum Diamanten í Kongliga Bókasavninum í Keypmannahavn. Sjálv tekur hon útlendskar framsýningar fram um ta einastu føroysku sensureraðu framsýningina, Várframsýningina.

– Framsýningin á Chalottenborg er ein størri framsýning, har nógv fólk koma. Hon hevur eisini hægri status, og er eitt forum, har fólk innan listaverðina koma at hyggja og forvitnast. Og hjá mær, sum royni at liva av at vera listafólk, má eg vísa verkini hjá mær á slíkum støðum, og tí er umráðandi at vera har. Og haðani kanst tú koma víðari, til gallarí og aðrar framsýningar. Hinvegin vil eg fegin vísa fram í Føroyum, hvat eg geri, soleiðis at føroyingar verða fortróligir við tað eg geri og meg, sigur Hansina Iversen.

Í mun til ung listafólk úr øðrum Norðurlondum er greitt ein fyrimunur at vera úr Føroyum, tá ið tað ræður um at sleppa við á innbodnar ferðaframsýningar í Norðurlondum, sum koma í teir bestu sýningarskálarnar, heldur Hansina Iversen.

– Fólk úr Norðurlondum og aðra staðni hava stóran áhuga í Føroyum og føroyskari list. Kanska tí landið er lítið og sjáldsamt. Teir sterku litirnir og ljósið í føroysku listini hugtaka fólk. Nú eg havi arbeitt í nøkur ár, verði eg boðin við á framsýningar, og tað er avgjørt eitt privilegium í mun til onnur ung. Tey skulu stríðast nógv meiri enn eg at sleppa uppí part, sigur Hansina Iversen.